# HEILSANIR



Tillukku við 18 ára degnum, góði Pætur - og takk fyri eitt gott kvøld, øll tit sum komu til føðingardagsveitsluna.
**Heilsan familjan**



Ja, ikki er gott at vita, hvat endar í grýtuni, tá hesin „piparkokkurin" fer at gera mat. Tillukku frá okkum.
**Tann brenda grýtan**



**Góða Doris**
Tillukku við 40 ára degnum í dag. Vit gleða okkum ordiliga nógv til í kvøld. Vit síggjast í suðri.
**Heilsan vit í B.G.**



Henda drotningin fyllir 40 ár í dag, hjartaliga tillukku við degnum, vit gleða okkum til ballið í kvøld.
**Heilsan bindiklubburin úr Vestmanna**

# TILTØK

**Gudstænastur**
**Sunnudagur 6. apríl**
**Boðanardag Mariu**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Konfirmatión, Erland Beder
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Konfirmatión, Heri Joensen
*Argir:* kl. 11, Bergur D. Joensen, Konfirmatión
*Nólsoy:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Vestmanna:* Føstugudstænasta kl. 18, John Myllhamar
*Miðvágur:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Sørvágur:* kl. 11, Konfirmatión, David Johannesen
*Bøur:* kl. 12 Inga P. Dam
*Kollafjørður:* kl. 12, Marjun Bæk
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10, *Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur
*Fámjin:* kl. 12, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar
*Øravík:* kl. 17, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar.
*Porkeris Kirkja:* Ólavur Rasmussen. Gudstænastan verður útvarpað. Talvan gongur fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, Jógvan Fríðriksson
*Gøta:* kl. 12 Familjugudstænasta, Martin R. Jacobsen
*Svínoy:* kl. 12, altarg., Elsa Funding
*Glyvrar:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Leirvík:* kl. 12, Uni Næs

## DIAMANTBRÚDLEYP

Hósdagin 10. apríl hava Elly og Eivind Niclasen, Klaksvík, verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin í Betesda leygardagin 12. apríl kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## BRÚDLEYP

Leygarmorgunin 12. apríl kl. 10.00 giftast í Ebenezer Sólvá Mørkøre, Tórshavn og Sam Vang, Oyrarbakki. Veitslan verður fyri innboðin á Hotel Føroyum kl. 13.00.

Mikudagin 16. apríl kl. 17.00 giftast Barbara Christophersen og Niels Uni Dam í Vesturkirkjuni. Familja, vinir og kenningar eru vælkomin í heiminum á Vættrastígi 6 eftir vígsluna.

Leygardagin 3. mai kl. 16.00 giftast í Hvannasunds kirkju Henny Stenberg, Porkeri og Magni Rubeksen, Norðdepli. Veitslan verður í Skálanum í Klaksvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 452151 í seinasta lagi 19. apríl.

Leygardagin 17. mai kl. 10.00 giftast í Býráðshúsinum í Tórshavn, Lisbeth á Marknagil, Klaksvík og Jóannes Næs, Hvalba. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 13.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarligast siga frá á tlf. 456240, 265474, 375185, 221020 áðrenn 3. mai.

Leygardagin 17. mai kl. 18.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Sunneva Petersen, Skálavík og Sofus Kristian Joensen, Kollafjørður. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Kollafirði. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarliga siga frá á tlf. 421815 ella 224804 áðrenn 1. mai.

Leygardagin 17. mai kl. 16.00 giftast í Vestmanna kirkju, Finngerð Egilsnes, Vestmanna og Ingolf Debes, Oyri. Veitslan verður í Eydnuni á Oyrabakka kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarliga siga frá á tlf. 424370, 424145 ella 422131 áðrenn 26. apríl.

Leygardagin 31. mai kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Ásla Djurhuus úr Vági og Sámal Pauli Johannesen úr Vági
og 27. mai hava Heidi og Mikkjal Djurhuus úr Vági silvurbrúdleyp
og 27. mai hevur Joselyn Niclasen úr Froðba 70 ára føðingardag.
Veitslurnar verða í VB-húsinum 31. mai kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 373233 ella 2662687 í seinasta lagi 30. apríl.

**Føstugudstænastur**
**Sunnudagin 6. apríl**
*Vestmanna:* kl. 18, lestur
*Kvívík:* kl. 17, Emil Olsen

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og møti, Suni S. Jacobsen talar um evnið »Kristus okkara fyrimynd – sum húshaldari«. heimasíða www.hebron.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta við konfirmatión, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Jens Garnfeldt, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Vón fyri framman.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin (missiónsmøti).
www.filadelfia.fo

**Samkoman Lívdin**
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómstiltak, Regin Guttesen talar um evni: »Samkynd, Biblian og samkoman«.
Sunnumorgunin familjumøti kl. 10.30 evnið er: Hvat segði Jesus um bøn? og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 er evnið: 1. Korint kap. 13-14 – Náðigávurnar 2, á báðum møtunum talar Jógvan Zachariasen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 19.30 úti á Fløtum. Jan Zachariasen greiðir frá arbeiði sínum á deyvabíbilskúlanum í Ungarn. Heimasíðan www.livdin.fo

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Mikukvøldið kl 20 Bønarmøti í Rhema.
Fríggjakvøldið kl 20 byrja møtini við Jens Garnfeldt úr Danmark.
Leygarkvøldið kl 20 møti í Rhema við Jens Garnfeldt.
Sunnudagin onki møti í Rhema vegna møtini við Jens Garnfeldt í Filadelfia kl. 11 og í Evangeliihúsinum kl 18.
Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Vikuskiftismøti fríggjadagin kl. 20 og leygardagin kl. 20, drekkamunnur aftaná.
Sunnudagin kl. 11 og 17 Suðuroyingar tala, syngja og vitna. Øll eru vækomin.
Sunnudagsskúli kl. 14. Á páskum fáa vit vitjan av Major Knut og Inger Ytterdal úr Noregi.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Christian Martin Christiansen.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdag kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taize) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa og barnadópur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møtirøðin við evninum: At tæna og hjálpa 1. Tessalonikubræv.
Mikudagin kl. 17 AWANA, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
www.ebenezer.fo

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Sólbjørg Símunarson. Evni: Jeremia bók.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Sjómanskvinnuringurin**
í Havn kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið 7. apríl kl. 19.30.

**Vikuskiftismøtir við Jens Garnfeldt**
Felagsmøtir verða við Jens Garnfeldt úr Danmark hesar tíðir: Fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl 20 í Rhema. Sunnumorgunin kl. 11 í Filadelfia, sunnukvøldið kl. 18 í Evangeliihúsinum.
Øll eru vælkomin.

**Glæman í Kvívík**
Vikuskiftismøti verður fríggjakvøldið kl. 19 við ungdómi av Skála.
Leygarkvøldið kl. 19 við Rannvá og Eiler Royðitoft av Strondum og sunnukvøldið kl. 19 við Regin Høgnesen og sangbólkurin Gittit syngur.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, Jón Miðberg talar.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti hjá Kristin og Gyndu Johansen.
Telefonandaktin 424741.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Agnar og Albin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Nebo Toftir**
Sangfundur við Siloakórinum verður á Svangaskarði sunnudagin kl. 18.00.

**Páskastevnan á Skála 2003**
Keldan skipar fyri páskastevnu, har vitjan verður m.a. úr Noreg. Eisini verða heimligar kreftir við.
Ungdómskvøld og Syng við møti verða eisini á skránni.

**Skála**
Í sambandi við Blákrosstevnuna hevur Sverri Steinhólm, prestur, gudstænastu við altargangi kl. 11.

**Elim í Søldarfirði**
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18 talar Philip Muinde. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Blái Krossur Føroya**
Í samband við aðalfundin í Meinigheitshúsinum á Skála um vikuskifti, verður bíbliutími leygarmorgunin kl. 11 v/ Thominu Davidsen, kl. 14 verður aðalfundur, kl. 16 verkætlanin »Børn í vanda« v/ Tórhild Bjarkhamar og kl. 20 Ungdómsmøti, ið BKU skipar fyri.
Sunnudagin kl. 14.30 verður familjumøti v/ Jónu Thomsen, kl. 16.30 Bíbliutími v/ Alfred Olsen, kl. 19 Hugnalig samvera har Sverri Kass talar.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Hjálp mín frá Harranum kemur*
*Sálmur: 121,3*

Menniskju leita eftir hjálp so mangastaðni. Ein, sum er sjúkur, fer til lækna, tað eigur hann at fara. Gud nýtir læknar og læknavitskap at linna um neyðina hjá okkum. Og summi gerast enntá frísk. Vit skulu ikki halda, at tann hjálp, sum læknin kann veita, og tann hjálp, sum fæst við bøn, eru mótsetningar.

Gud kann ganga so nógvar vegir, tí hann er alvalds Gud. Gud okkara er ikki avmarkaður til bert at geva linna við bøn. Gud nýtir mong menniskju at linna um neyðina hjá teimum sjúku. Nei, Gud er ikki avmarkaður, hvørki so ella so. Vit kristnu síggja Guds stórleika í tí, sum hendir í lív okkara.

Gud hjálpir á so mangan hátt. Vit skulu ikki spyrja, um hjálpin kom frá læknanum ella frá Gudi. Men vit skulu siga, at Gud nýtir hesi menniskju í síni tænastu – hann kann nýta tey, tó at tey ikki eru kristin. Gud er størri enn vit kunnu fata. Síggja ein góðan vin í næsta tínum. Tá ið hann hjálpir og dugnar tær, skalt tú síggja Guds hjálpandi hond í næsta tínum.

Tað er ikki so, at antin er tað læknin, ella er tað Gud, sum hjálpir. Tí næsti tín kann einki gera, uttan Gud hjálpir honum. Alt kemur frá Gudi gjøgnum onnur menniskju. Og vit kristnu eru sett at veita hinum hjálparleysa linna og hjálp, og í hesi tænastu gerast vit ongantíð arbeiðsleys.

Amen

**David Johannesen**



# TILTØK

**Keldan**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Odu, Duritu og Lindu. Sunnukvøldið kl. 17 Møti við Martin Olsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.

**Gøta**
Í samband við tiltak hjá BKU fara vit til Skála á ungdómsmøti í kvøld kl. 20. Bilar koyra frá kirkjukjallaranum kl. 19.30. Øll eru vælkomin við.

**Gøta**
Týsdagin 8. apríl kl. 20 Glyvra-Hanusars hús, bibeltime: 1. Korintherbrev 15.29 ff. v/ Peter O. K. Olofson.

**Eiði**
Vármøtini halda fram við vitnimøti í kvøld kl. 20 (ung vitna). Ungdómskórið Effata av Strondum syngur. Bønarløta verður kl. 19.30. Sunnudagin kl. 11.40 skriftarmál, kl. 12 Messa v/ Emil Olsen, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti v/ Sigurd Sørensen. Jónhilda og Gullak syngja. Innsavnan til Karmel. Bønarløta verður kl. 18.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 17 Møti við Palla Højgaard.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Barnaarbeiði (3) 4 til 6 ár, kl. 14 Barnaarbeiði 1., 2. og 3. flokkur, kl. 16 Barnaarbeiði 4., 5. og 6. flokkur.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og Lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sands missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Hermon, Norðdepli**
Fundarrøðin, har talað verður um afturkomu Jesusar, heldur fram í kvøld kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Í kvøld verður evnið »Hví má Jesus koma aftur?«. Sunnukvøldið verður evnið: »Hvat hendir tá ið Jesus kemur aftur?«. Jógvan Páll Sevdal og Svenning av Lofti tala. Magnus Poulsen, Erland Frederiksberg, Bjørn Simonsen o.a. spæla og syngja.

**Betesda, Klaksvík**
Leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 verður evangel. fundur, har Levi Joensen og aðrir tala. Manskvartettin og sangkórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Onki ungdómsmøti er fríggjakvøldið.
Leygarkvøldið kl. 20 Hugnakvøld har Gladys á Kósini og onnur syngja, felagssangur og drekkamuður.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við Poul Nicolai Stenberg. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarmorgunin kl. 10 Undirvísing um depressión v/ Birgit Tind.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús. Team úr Kolding luttekur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Team úr Kolding luttekur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Karl og Katrinu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Cafe One Way, Tvøroyri**
MAF kunningarfundur verður leygarkvøldið kl. 20 og **Sunnudagin kl. 11 í Sion í Vági**. Greitt verður frá hvussu tey 180 flogførini hjá MAF hjálpartrúboðarum, læknum og hjálparfólki koma fram á nærum ómøguliga atkomandi støðum. Hvørt 7. minutt døgnið runt fer eitt MAF-flogfar á eina trúboðara- ella hjálparferð. Videofilmur verður. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betania, Porkeri**
Kvinnumøti verður leygardagin kl. 16. M.o. luttaka Elsa í Skorini, Anna Maria Joensen og Jona Nielsen. Anja Hansen syngur. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Bygdarhúsið í Lopra**
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Felagsmøti fyri Vág, Porkeri, Hov og Sumba við Terja og Hallur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Ongi møti verða hetta vikuskiftið vegna luttøku á vikuskiftismøtum hjá Frelsunarherinum í Havn. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Sion, Vágur**
Sunnumorgunin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti. Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Føroyahúsið**
Pálmasunnudag 13. apríl kl. 18 er evangel. møti í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A, Jógvan Zachariassen talar. Vitnisburður, sangur og felagssangur er eisini á skránni. Aftaná er ókeypis te/kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Randers**
Føroyskt møti verður í »Saron«, St. Blichersgade 1C, sunnudagin 6. apríl kl. 15.30, v/ Hera Elttør, trúboðara. Eisini verður hugnalig samvera við kaffi o.ø. Høvi verður at geva eina gávu til arbeiðið. Allir føroyingar eru hjartaliga vælkomnir.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Opið er mánadag og mikudag frá kl. 14-17 í missiónshúsinum á Sandi. Drekkamunnur er at fáa báðar dagarnar.
*Mánadagin 7. apríl* fara vit útferð í Slavansdalin, har Unni Hentze sigur frá Noregstúrum. Farið verður úr Tilhaldinum við bussi kl. 14 og vit verða aftur í tilhaldinum kl. 15.30. Bussurin koyrir tætt til húsini. Tilmelda er til túrin.
*Mikudagin 9. apríl* er stongt vegna skeiðvirksemi.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61 655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 7. apríl*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30 Veving á loftinum. Seyma fýrkantar til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving o.o. spøl. Tilm. til páskadøgurðan mikudagin, tlf. 316491
*Týsdagin 8. apríl*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Johan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Frágreiðing um fólkapensiónina.** Finnur Joensen frá Almannastovuni.
*Mikudagin 9. apríl*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Páskadøgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 **Túrur niðan undir Svartafoss**
*Hósdagin 10. apríl*
kl. 10-10.30 **Fimleikur**, Sonja Danielsen
kl. 14-17 **Telduprát**, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 11. apríl*
kl. 14-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin 6. apríl verður gongutúrurin Syðrugøta-Gjódalur-Trælavatn-Kambsdalur gingin. Um áhugi er, verður møguliga eisini farið niðan á Tyril. Túrurin er miðal. Møtt verður við grótbrotið omanfyri Syðrugøtu kl. 14. Nýggir limir eru vælkomnir at luttaka.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 5.4. Runavík, tlf. 44 80 16
Sunnudagin 6.4. Eiði, tlf. 42 30 06

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## KONFIRMATIÓN

### Konfirmantar í Vesturkirkjuni 6. apríl 2003

Ólavur Danielsen, Velbastaðvegur 50
Hjalti Christian Gram, Tórsteinsgøta 4
Óli Restorff Hansen, Heygsvegur 15
Elis Johannesen, Dalatún 8
Geir Grækarisson Johansen, Undir Brúnni 21
Karl Johan Midjord, Heygsvegur 12
Asbjørn Mørkøre, Perskonugøta 10
Bárður Reinert Poulsen, Noregsvegur 11
Eivind Johan Tauser, Blankagøta 7
Sjúrður Búason Tórgarð, Íslandsvegur 25a
Rúni Vatnsdal, Flatnagerði 10b
Karin Herdis Højgaard, Brekkugøta 7
Malan Mohr Joensen,Grønlandsvegur 49
Sissal Carlsdóttir á Lag, Livulág 2
Turið Nattestad, Hvalsoyargøta 11
Sissal Randarsól Næs, Reynstún 11
Brynhild Fríðheim Petersen, J. C. Svabosgøta 27
Kristina Arge, Dalagøta 7

### Konfirmantar í Argja kirkju 6. apríl 2003

Óli Niels Andresen, Heiðagøta 13
Rói Danielsen, Reynstún 10
Bjarki Hansen, Støðlagøta 18
Dion Brynjolf Splidt Jacobsen,Reynstún 29
Teitur Jóannesarson, Argjaboðagøta 34a
Kim Arnbjørn Mouritsen Møller, Garðsgøta 27
Frida Kristina Johannesen, Traðagøta 14

### Konfirmantar í Havnar kirkju 6. apríl 2003 kl. 11.00

Sonya Emilia á Argjagarði, Argja Róðrarfel., Argjavegur
Bjartur Andreasen, Uppi á Kletti, Hvítanes
Høgni Dam, Láarvegur 16
Fríða Djurhuus, Tórgarðsgøta 15
Rúna Højgaard, Óluvugøta 8
Sámal Petur Jensen, Brattabrekka 14
Steingrímur Eikholm Joensen, Javnagøta 7
Elsa Debess Johannesen, Pætursgøta 11
Julianna Mørkøre, Hvítanes
Jóhan Persson, Áargeil 25
Anja Eyðgerðardóttir Sørensen, Børkugøta 19